# Country Sisters á Hotel Føroyum

**Fríggjakvøldið 21. oktober verður dansur við kekkisku Country Sisters á Hotel Føroyum**

DANSUR




Tær hava verið í Føroyum tvær ferðir áður, og hava tær hugtikið nógvar føroyskar áhoyrarar við sínari sermerktu framførdslu við sangi, spæli og dansi. Country Sisters hava eisini spælt til dans á Hotel Føroyum fyrr, hetta var í 2003, og var hetta eitt sera væleydnað kvøld.

Tær gleða seg til hesa Føroyaferðina og vita eisini, at nú eru nógvir fjepparar, sum tær gleða seg at síggja aftur.

Sum sagt koma Country Sisters úr tí vakra landinum, sum liggur mitt í hjartanum av Europa - Kekkia.

Fyri 20 árum síðani byrjaði ein bólkur av entusiastiskum gentum tann fyrsta gentubólkin í Europa, sum bert spældi country tónleik. Í 1989 komu tær veruliga á tann europeiska pallin. Síðani tá eru nøkur ár gingin, og bólkurin hevur ment seg til, at vera ein av teimum bestu country bólkunum í Europa. Tær vitja nógv lond um allan heimin og hava eisini fanklubbar í nógvum londum. Á okkara leiðum eru tær oftast í Danmark, men eisini Ísland, Grønland og Norra hava verið karmur um teirra framførslur.

Bólkurin er samansettur av seks vøkrum og sera dugnaligum tónleikarum. Tær eita Susan, Sonia, Lenka, Linda, Lucy og Wendy. Tær hava allar útbúgving innan tónleik og dans, tær spæla upp á fleiri ymisk ljóðføri, syngja og dansa einastandandi. Country Sisters spæla ymiskan klassiskan countrytónleik, gospel, rock'n roll og modernaðan country stíl- cajun, bluegrass. Tær framføra teirra egna tónleik og mong onnur kend country løg, sum t.d. løg hjá Shanaiu Twain, Bob Tyler, Ricky Skaggs, H.Williams, Bill Haley,etc. Við tí tráðleysu mikrofonútgerðini og hvítt lakeraðu ljóðførunum, leggja tær upp til eina ógloymandi framførslu.

Bólkurin var kosin at vera besti Country bólkur við live framførslu 2003 í Europa.

Í 2004 kom teirra nýggja fløga, og er tað fløga nr. 8 í røðini. Hon hevur heitið – The Best Of. Saman við fløguni fylgir ein dvd, har teirra fjepparar kunnu síggja, hvussu bólkurin hevur ment seg frá byrjanini. Genturnar sum nú eru við í bólkinum, hava trý ára á baki. Og ein teirra hevur so spælt við líka frá byrjanini. Nógv fólk spyrja, um tær veruliga eru systrar? Men tað eru tær ikki. Tað er bara eitt kunstnaranavn.

Fløgan The Best of og aðrar eldri fløgur verða til keyps á dansistaðnum.

Í samband við dansin bjóðar Glasstovan serliga matskrá hetta kvøldið við Country búffi. Tilber at lesa meira um hetta á www.hotelforoyar.fo Eisini ber til at bíleggja sær borð á heimasíðuni ella á tel. 317500.

Dansurin fríggjakvøldið 21. oktober á Hotel Føroyum byrjar kl. 23.30. Atgongumerkini til dansin kosta kr. 180,00 og fáast til keyps á Kunningarstovuni í Havn, Kunningarstovuni í Runavík og á Hotel Føroyum.

FØROYA KOMMUNUFELAG

*Starvsfólk til Agenda 21 Stovuna*

Starv hjá Føroya Kommunufelag er leyst at søkja til setan skjótast gjørligt. Starvið verður sett í samband við eina játtan frá Innlendismálaráðinum til umhvørvis- og náttúruverndartiltøk.

**Uppgávur**
Starvið bjóðar uppá spennandi avbjóðingar har tú fært høvi til at skapa tínar egnu karmar á nýggjum øki og soleiðis vera við til at ávirka arbeiðsgongdina í Agenda 21 í Føroyum.

**Førleikakrøv**
Fyri at røkja starvið er neyðugt at tú ert ágrýtin, kanst arbeiða sjálvstøðugt men eisini hevur góð samstarvsevni og kann vera íbirtari fyri onnur. Neyðugt er at duga føroyskt, skandinaviskt og enskt og hava hollan kunnleika til Office forritini.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er um fulltíðarsett starv. Roknast má við, at til tíðir verður neyðugt at arbeiða uttanfyri vanliga arbeiðstíð. Løn samb. avtalu.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til skrivstovu FKF á tel.: 590 764. Sí eisini www.fkf.fo.

Umsóknarfreist er 24. oktober 2005. Umsóknir verða at senda til:
Føroya Kommunufelag
P.o.Box 73
600 Saltangará

*Agenda 21 kann í stuttum lýsast sum heildarætlan um burðardygga menning í 21. øldini. Ætlanin er ikki einans um umhvørvismál í vanligum týdningi, men er eisini ætlað at taka atlit til fíggjar- og felagsligar tættir.*

# Jólagávur til illa stødd børn

TÍÐINDASKRIV

Mikukvøldið verður høvi á Toftum at frætta meiri um Christmas Child tiltakið, sum snýr seg um at senda jólagávur úr Føroyum og til børn kring heimin. Kunningin verður í Nebo á Toftum klokkan sjey mikukvøldið.

Christmas Child er tiltak í sambandi við Samaritan`s Purse, sum seinastu 25 árini hevur glett meiri enn 38 milliónir børn við at geva teimum eina skógvaeskju við gávum.

Tað er Franklin Graham, sum stjórnar vælgerandi felagsskapinum. Hann er sonur navnframa Billy Graham.

Í fjør vórðu meiri enn 7,4 milliónir skógvaeskjur sendar neyðstøddum børnum í 95 londum. Í samstarvi við kirkjur, samkomur og vælgerandi felagsskapir á staðnum verða skógvaeskjurnar bornar børnum á sjúkrahúsum, barnaheimum, í flóttalegum, býlum fyri heimleys og í fátækrabýlingum.

Í fjør vóru 1760 skógvaeskjur fyltar við gávum sendar úr Føroyum og til børn í Rumenia. Fyrireikararnir vóna, at tað skal bera til undan jólum í ár at senda 3000 skógvaeskjur við jólagávum úr Føroyum. Hvussu tað ber til at gerast partur av tiltakinum, og hvat tað ber til at geva, fæst nærri at vita um í Nebo á Toftum klokkan sjey mikukvøldið.

# Lívsins Land aftur mest selda fløga

**2000 seld eintøk av Lívsins Land innan fyri ein mánað ger fløguna til skjótast seljandi útgávuna hjá Evangelisku Røddini, og nú næsta upplag er komið til landið, liggur fløgan aftur ovast á sølulistanum, sum 3'arin kunngjørdi mánadagin**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Fløgan Lívsins land við Ólavi á Váli hevur endurtikið toppin á sølulistanum hjá 3'aranum. Fløgan lá í tríggjar vikur ovast á sølulistanum, áðrenn hon varð útseld. Hetta merkti, at Now 13 og savnsfløgan hjá Kularrótum sluppu at lána fyrsta plássið í tvær vikur. Men nú er eitt nýtt upplag komið.

Útgevarin Evangeliska Røddin sigur, at fyrstu 2000 eintøkini vórðu seld innan fyri ein mánaða, og tí gjørdist eitt stutt tíðarskeið, har ongar fløgur vóru, men nú skuldu allir handlar havt fløguna aftur. Petur Sørensen úr Evangelisku røddini sigur, at hetta er best eydnaða útgávan hjá forlagnum, og tað gleðist hann um.

Now 13 er dottin niður á triðja pláss, og Kularrøtur á fjórða, nýggj inni á øðrum plássi er Highest Hopes fløgan og dvd'in hjá Nightwish.

Umframt Lívsins Land og Kularrøtur er einasta føroyska fløgan á listanum Førist hjá Páll Finnur Páll. Hon er hesa vikuna dottin heilt niður á 10. pláss.

Alt hjá Kim Hansen, sum hevur verið trúgv í top 5, síðan hon kom út í summar, er dottin av listanum hesa vikuna. Sambært 3'aranum er hetta ikki tí, at sølan av fløgum hjá Kim er minkandi seinastu vikuna, men heldur eitt úrslit av, at fleiri nýggjar fløgur eru komnar á marknaðin, og nógva sølan av teimum, hevur skumpað Kim av listanum. Fløgan við Kim selur øgiliga støðugt.